Lagt til rættis: Snorri Brend *snorri@sosialurin.fo*






*Hesa vikuna:*

**Jógvan Zachariasen**

## Keyp hina lagaligu tíðina

Øll okkara hugsa regluliga um okkara vantandi tíð. Flestu okkara høvdu ynskt at havt meiri tíð, soleiðis at vit kundu gjørt alt tað, vit so fegin vildu gjørt.

Kortini vita vit øll, at tíð er nakað sum eingin fær meira ella minni av. Har eru vit øll líka. Vit hava øll fingið 24 tímar hvønn dag.

Flestu okkara hugsa tó ikki um, at vit hava fingið okkara tíð at ávirka og umbroyta menniskju, sum eru fortapt. Gud kallar á okkum um at "keypa hina lagaligu tíð – tí dagarnir eru óndir!" (Efesusbrævið 5:16).

Tann lagaliga tíðin, sum Paulus tosar um her, er ikki tíðarfest tíð. Um Paulus hevði hugsað um tíðarfesta tíð, hevði hann brúkt orðið "chronos". Men Paulus brúkar orðið "kairos", sum tosar um ásetta tíð – rætta tíð ella lagaliga tíð (Róm. 5:6).

Vit mugu brúka tíðina at fáa sum mest burtur úr teimum møguleikum, sum Gud hevur givið okkum ásettu tíð okkara! Møguleikarnir eru allastaðni rundan um okkum, og teir eru bert okkara – bert tínir og mínir.

Tíðin er stutt, og hon er ónd. Tað góða er tað, at hvør okkara kann við Heilaga Andans styrki í tí stuttu tíð, vit hava, spreiða ljós í einum myrkum heimi.

Mín bøn er, at vit øll í framtíðini fara at hugsa meiri um okkara lagaligu tíð, enn okkara vantandi tíð.

# Gud finst í heilanum



*- Tað hendir nakað við teimum sum biðja, vísir eitt úrslit av kanningini*

*tilvildarlig mynd*

**- Gud er eins veruligur hjá tí biðjandi sum hann er hjá øðrum menniskjum. Økini í heilanum, sum verða aktiverað undir bøn, eru tey somu sum verða aktiverað, tá vit venda okkum til onnur menniskju, sigur Uffe Schjødt, sum er Ph.d.-lesandi á Lærda Háskúlanum í Århus**

„Hvat hendir í heilanum hjá teimum, sum biðja eina bøn?"

Henda spurningin ynskti hann at fáa svar uppá, og nú eru fyrstu úrslitini av kanningini almannakunngjørd:

Tey flestu ivast neyvan í, at trúgvandi menniskju trúgva á tann Gud, sum tey biðja til. Men hetta er fyrstu ferð, at hetta verður prógvað við royndum.

Viðmerkingarnar frá trúgvandi og ateistum vísa eisini, at hetta hevur teirra áhuga. Tey kristnu fegnast um, at Gud manifesterar seg í heilanum hjá trúgvandi, og ateistarnir fegnast um, at talan bert var um eina illusjón í heilanum.

Uffe Schjødt er nú í ferð við seinna part av verkætlan síni. Hann kannar nú, hvat hendir í heilanum á fólki ið taka ímóti forbøn. Hesar royndirnar eru ikki lidnar enn.

### Bønin virkar

Fólk seta ofta spurningin um bønin virkar, og sambært Uffe Schjødt hevur bønin ein virkning, hóast tað kanska ikki er soleiðis, sum tey flestu trúgva.

Sjálvur heldur hann ikki, at Gud grípir inn í lívið hjá menniskjum orsakað av bøn og fremur undur. Men hvørja effekt hevur bønin so?

- Eg eri samdur við teimum, sum meta religiøsa atferð sum sjálvsterarpi og sum eina ávirkan á áskoðanina hjá fólki. Fært tú avbjóðingar í lívinum, um tú gerst sjúkur ella missir ein av tínum kæru, so má ein fáa sína lívsstøðu at hóska til tann nýggja samleikan.

- Her kann bønin hava sín avgjørda leiklut. Og so vita vit annars, at tá ein endurtekur eina handling, sum ein er tryggur við, kann hetta geva hvíld og virka ímóti strongd, staðfestir Uffe Schjødt.

Og hann leggur aftrat:

- Um ein trýr, at tað í veruleikanum finst ein Gud, sum tryggjar at bønin virkar, so kann hetta eisini hava ávirkan, eins og ein placebo-effekt.

- Tað at trúgva uppá, at okkurt virkar, kann snøgt sagt geva eina eyka effekt. Hetta er eisini treytað av, at tann biðjandi í veruleikanum trýr uppá bønarsvar. Um ein ikki-religiøsur biður eina bøn, missir ein placebo-effektina.

# Logos Hope ikki til Keypmannahavn

**Tað kom óvart á mong, tá tíðindini bórust um, at Logos Hope ikki kemur til danska høvuðsstaðin á hesum sinni**

- Vit eru eisini vónbrotin, verður sagt av høvuðsskrivstovuni hjá OM í Danmark.

At vitjanin ikki verður veruleiki sum ætlað hevur sínar orsøkir: Fólk innan OM-felagsskapin meta, at umstøðurnar umborð ikki enn eru heilt nøktandi til eina so stóra vitjan.

- Tí kann Logos Hope ikki verða hóskandi karmur um eina almenna vitjan, sum vit annars miðaðu fram ímóti, verður sagt.

Hinvegin er ætlanin at Logos Hope skal leggja at við bryggju í Køge, liggur beint sunnanfyri Keypmannahavn.

Hetta hendir 17. juni og í hesum sambandi verður skipað fyri ymiskum tiltøkum, eins og fólk fáa høvið at vitja umborð á gomlu Norrönu.

Eingin orsøk er at skunda sær umborð, tí skipið verður liggjandi í Køge fram til 20. august.

## Byggja nýtt Berøa

**Runavík:** Eftir at hava húsast í gamla samkomubygninginum í mong ár, ætlar samkoman í Berøa nú at byggja nýggjan bygning til stóra virksemið millum børn, ung og vaksin. Sum skilst verða eini 290 sitipláss í salinum.

## Fimm legur við Ástjørn

**Ísland:** Aftur í summar verður leguhúsið við Ástjørn (myndin) karmur um fleiri legur fyri børn og ungdóm. Fyrsta legan byrjar 18. juni og síðani verður hildið á heilt fram til 15. august. Miðað verður eftir at 230 børn skulu fara á legur í ár, skrivar kristnastova.dk.



## Nýtt Blákrossheim fyri 10 mió

**Nes:** Bláikrossur hevur leingi havt í hyggju at byggja nýtt blákrossheim á Nesi. Í løtuni verður arbeitt við fíggingini, og veður í løtuni søkt um stuðul frá øllum kommunum í Føroyum til ætlanina. Ætlaða heimið kostar 10 mió krónur, og er ætlanin at útvega ein triðing av hesum frá kommununum.

## Gudstænastur við evnum

**Hoyvík:** Í summar fer fríkirkjan Oasan, sum nakað nýtt, at hava ávís evnir til gudstænasturnar sunnumorgnar. Ætlanin er, at tey í juni mánaði skulu viðgerða evnið „Tað, sum hendi á apostlanna døgum - kann tað eisini henda á okkara døgum?". Tey hava upplivað nógvar grøðingar hesa seinastu tíðina, og sum sagt verður: - Tað eru fleiri ítøkiligir vitnisburðir um, at tað sum Guds orð sigur stendur klettafast.